# Hittast aftur eftir 60 ár

**Tann 3. juli í ár hittast 42 av teimum gott og væl fimti næmingunum, sum byrjaðu í fyrsta flokki í Klaksvík í 1944. Seks av floksfeløgunum hava arbeitt við at finna øll aftur síðani áðrenn nýggjár, og nú er so gott sum alt klárt til sameiningina**

SAMEINING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Liden, Ása, Ásbjørg, Eiler, Hergerð og Katrin eru øll spent til tann 3. juli, tá tey saman við sínum floksfeløgum í barnaskúlanum fara at hittast aftur, nú tað eru 60 ár síðani, at tey fóru í skúla*

**Klaksvík:**
Prátið hoyrist út í gongina, og tað gongur lívliga fyri seg. Inni í stovuni ella køkinum, sum eru í einum, sita seks fólk. Hergerð, Eiler, Ásbjørg, Liden, Katrin og Ása. Tey hava øll tað tilfelags, at tey byrjaðu í fyrsta flokki í 1944. Og nú eru tey við at leggja seinastu hondina á eina sameining, sum fevnir um allan árgangin.

52 brøv vórðu send út beint eftir nýggjár og av teimum hava 42 boðað frá, at tey vilja verða við. Og tað fegnast fyrireikararnir um.

Leygardagin tann 3. juli hittast tey so øll. Fyrst verður farið í skúlan, síðani er ein gongutúrur út í Grøv á skránni, um tað viðrar, og um kvøldið verður so farið norður á hotel Norð á Viðareiði til ein døgurða. Tað er ongin ivi um, at hesi seks fólkini eru sera spent til hendan stóra dagin. Hetta er fyrstu ferð, at árgangur 44 hittist aftur, so tað er rættuliga langt síðani, at summi av teimum sóust seinast.

Tað hoyrist á teimum, at tey hava lagt nógva orku í, og ferð eftir ferð er tað onkur, sum tekur til, hvussu spentur hon ella hann er.

## Endurminningar

Eisini gongur prátið dúgliga um gamlar tíðir. Hetta eru jú gamlir floksfelagar, og tey hava sum vera man nógv at tosa um.

– Oys, minnast tit stovu nummar 12. Hana sum vit plagdu at fara niður í, tá teir bombaðu, spyr Liden. Hini nikka samtykkjandi, og tey rista øll við høvdinum, tí hesi minnini eru ikki so góð. Men ein beiskur veruleiki sum partur av teirra fyrsta skúlaári.

Tey greiða frá, at tey vóru ikki so nógv úti aftaná skúlatíð um ta tíðina.

– Aja, tað vóru aðrar tíðir, sigur Ása seigliga, men smílandi.

Aftur fara tey at práta um tað, sum liggur fyri framman. Eru nú sangirnir komnir upp á pláss, kaffi keypt, koppar og so framvegis. Alt hetta, meðan tey njóta ein góðan kaffi ella temunn frá Hergerð og Eiler og køku afturvið.

Men meira enn einaferð dettur prátið inn aftur á gamlar dagar í skúlanum. Og enn ein "ræðusøga" kemur fram. Ella í øllum førum ein ræðusøga fyri okkum, sum byrjaðu at ganga í skúla, eftir at doyvingin varð uppfunnin.

– Minnast tit, tá tannlæknin plagdi at koma. Tey komu bara inn eftir okkum ein og ein, letur í Eiler.

– Ja, og eg minnist handan sangin, sum vit plagdu at syngja fyri, at vit ikki skuldu hoyra, um tann, sum var í stólinum, fór at gráta, sigur Ásbjørg.

Eisini greiða tey frá, hvussu tað var at fara undir brúsu í ísakøldum vatni eftir fimleik. Og ikki at gloyma at fara út í Grøv at svimja.

## Norðmaður við

Ein teirra, sum verður við, er ein norðmaður, sum gekk í flokkinum í eina stutta tíð. Tað eydnaðist teimum at finna fram til hansara, og hann var so glaður, at hann boðaði frá, at hann kom við einans tríggjar tímar eftir, at hann hevði fingið brævið.

Annars halda tey, at tað gekk eitt sindur trekt at fáa gongd á tilmeldingarnar, men tær komu so líðandi. Og í dag eru sum sagt bert tíggju avboð.

– Vit fingu eitt avrit av protokollini, tá vit byrjaðu. Og tá vit so høvdu funnið bústaðirnar hjá øllum, skrivaðu vit eitt bræv og koyrdu somuleiðis eitt avrit av protokollini í, so at øll kunnu síggja, hvørji koma við, greiðir Katrin frá.

Og nú eru bert snøklar eftir hjá teimum at fáa upp á pláss, áðrenn stóra dagin.

– Vit eru so spent at síggja øll aftur. Tað verður spennandi at vita, hvussu tað verður at tosa saman aftur aftaná so mong ár, sigur Hergerð. Fleiri av teimum hava sjálvandi sást upp gjøgnum tíðina, men hetta er sum sagt fyrstu ferð, at allur árgangurin hittist aftur.

# Fáa føroyingar til gongu

**Meira og meira verður gjørt við gongutúrar innan føroysku ferðavinnuna. Fyri stuttum kom gongufaldarin hjá Ferðaráðnum út á føroyskum umframt donskum og enskum. Og nú er Ferðaráðið júst farið í gongd við eina lýsingarherferð, sum skal fáa føroyingin upp úr sofuni ella úr bilinum og út í náttúruna at ganga**

FERÐAVINNA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Summar er, hóast veðurgudarnir ikki hava víst seg frá síni bestu síðu higartil. Mánadagin er longsti dagur, og tað plagar at vera eyðkent, at skipað verður fyri ymsum útferðum ella gongutúrum í tí sambandinum.

Í snotuliga gongufaldaranum hjá Ferðaráði Føroya, sum fyri stuttum kom út á føroyskum, eru nógvir hentir upplýsingar til fólk, sum hava hug at ganga túrar í fjøllunum. Har stendur millum annað, hvussu langir túrarnir eru, og hvussu langa tíð tað tekur. Hvussu ein gongur, og hvar ein skal fara fyri at koma higar túrurin byrjar. Fyri mong kanska púra óneyðugir upplýsingar, men helst til stóra nyttu fyri uppaftur onnur.

14 ymiskar gøtur eru í honum, og er tað upplagt til tey, sum kanska ikki hava so góðan hug at verða í teimum fyriskipaðu túrunum. Men hesir eru sjálvandi eisini ein møguleiki.

Birita Nolsø, sum er samskipari á innlendisdeildini á Ferðaráðnum sigur, at gongutúrarnir verða alsamt betri og betri umtóktir – eisini millum føroyingar.

Gongufeløgini skipa eisini fyri fleiri túrum, samstundis sum tey eisini gerast fleiri í tali. Og tað fegnast Birita um.

Inntil í ár kom gongufaldarin bert út á donskum og enskum. Men í ár varð so gjørt av at geva hann út á føroyskum eisini.

– Vit hava arbeitt so nógv við at fáa útlendingar til gongutúrar her í landinum, men vit mugu ikki gloyma, at føroyingar líkaso væl eru ein upplagdur málbólkur, sigur Birita.

Samstundis vónar hon, at ferðsmiðir fara at nýta hendan gongufaldaran í teirra pakkaferðartilboðum.

## Øllum veðri

Veðrið ræður fyri øllum í Føroyum, men tá tað kemur til gongutúrar heldur Birita ikki, at tað hevur líka nógv at siga.

– Sjálvandi er tað lekkurt at ganga ein túr í fjøllunum í fagrasta summarveðri, men tað ber til at ganga í fjøllunum í nærum øllum veðri. Upplivilsini verða bara øðrvísi, alt eftir veðrinum, greiðir hon frá og vísir samstundis á, at fleiri av gongufeløgunum skipa fyri gongutúrum alt árið runt.

Hon heldur, at ein gongufaldari er sera kærkomin, tí hann fær fólk at síggja møguleikarnar, sum tey hava.

– Her hevur tú jú tvey at velja ímillum. Tú kanst fara einsamallur, ella tú kanst fara til ein fyriskipaðan gongutúr, sigur Birita Nolsø.

Gongufaldarin frá Ferðaráðnum fæst á øllum kunningarstovum kring landið og kostar tíggju krónur.




*Ferðaráð Føroya er nú farið undir eina lýsingaherferð til tess at fáa fleiri føroyingar gongutúrar í okkara vøkru og stórslignu náttúru*
*Mynd: Forsíða á gongufaldaranum hjá Ferðaráðnum*



# Løgreglan kroysti motorsúkklur av vegnum



*– Vit vóru á veg suðureftir og komu út úr Kollfjarðatunnlinum Kaldbaksmegin, tá ein politibilur stýrir yvir í okkara bana og kroystir okkum út av vegnum, greiðir ein motorsúkkluførari frá, sum vil vera ónevndur*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Undir politijagstranini týsdagin í Suðurstreymoy, tá løgreglan fangaði 20 ára gamlan motorsúkkluførara við eini ferð á 193 km/t, kroysti løgreglan tveir aðrar ósekar motorsúkkluførarar av vegnum. Førararnir hava meldað løgregluna fyri tilburðin**

FERÐSLA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Talan var um sannan dramatikk millum Havnina og Kollafjørð týsdagin seinnapart. Løgreglan jagstraði ein 20 ára gamlan motorsúkkluførara, sum varð máldur at náa eini ferð á 193 km/t, og hesin varð fangaður við Mjáuvøtn í Kollfjarðadali, eftir at ein annar motorsúkkluførari eisini varð tikin fyrr um dagin.

## Kløkkir og østir

Men jagstranin fekk eisini avleiðingar fyri tveir aðrar ósekar motorsúkkluførarar, sum vóru á veg suðureftir, tá løgreglan jagstraði einu motorsúkkluna norðureftir. Sosialurin hevur tosað annan teirra, sum vil vera ónevndur, og hann greiðir soleiðis frá.

– Vit eru á veg suðureftir og koma út úr Kollfjarðatunnlinum Kaldbaksmegin, tá ein løgreglubilur kemur ímóti okkum. Hann heldur helst, at annar okkara er hann, sum verður jagstraður og hevur vent við, og so stýrir hann yvir í okkara bana og kroystir okkum út av vegnum, greiðir viðkomandi motorsúkkluførari frá. Hann sigur, at áðrenn teir vórðu kroystir út í rabattina fram við vegnum, rendu motorsúkklurnar saman, og materiellur skaði stóðst av hesum, hóast eingin teirra varð løstaður. Hetta var tann aftasti av tveimum løgreglubilum, og hann var somikið langt aftanfyri jagstraðu motorsúkkluna og hin løgreglubilin, at hann møguliga ikki visti betri.

Motorsúkkluførarin greiðir frá, at teir frammanundan møttu jagstraðu motorsúkkluni við ýlandi ferð við tunnilsmunnan Kollfjarðamegin, og miðskeiðis í tunnlinum kom fyrri løgreglubilurin við sera høgari ferð eisini ímóti teimum. Tá teir so komu út úr tunnlinum í Kaldbaksbotni, møttu teir løgregluni í sivilbili, sum stýrdi ímóti og kroysti teir av vegnum, áðrenn hann fór víðari.

– Tað var ein einstakur løgreglumaður í bilinum, og tá hann fann útav, at vit vóru skeivu motorsúkklukoyrararnir, koyrdi hann víðari, og vit stóu sera kløkkir og østir eftir, sigur annar motorsúkklukoyrarin. Hann sigur, at teir vóru hepnir at sleppa so lætt, tí við meiri ferð kundi skaðin saktans verið størri orsakað av avgerðini, viðkomandi politistur valdi at taka.

– Tá politisturin stýrdi yvir í okkara bana beint ímóti okkum, føldi eg, at nú fór at enda galið, men tíbetur sluppu vit, verður greitt frá. Annar motorsúkkluførarin heldur, at vandamikla koyringin hjá løgreglumanninum er átalu vert, hóast hann sigur, at hetta nokk var eitt menniskjaligt mistak í eini hektiskari politijagstran.

## Meldaðu

Teir báðir motorsúkklukoyrararnir hava meldað tilburðin í Kaldbaksbotni týsdagin, og teir siga, at eitt sakarmál væntandi verður av tilburðinum.

– Nú veit eg ikki, hvat alt endar við, men vit halda, at tilburðurin ikki kann góðtakast, og so fáa vit at síggja, hvat hendir, sigur motorsúkkluførarin at enda, sum saman við vinmanni fekk ein veruligan hvøkk týsdagin, tá løgreglan stýrdi ímóti og noyddi teir av vegnum fyri síðani at koyra víðari.

## FAKTA

Fyrsta hálvár í 2003 vórðu 42 motorsúkklur innfluttar til Føroya

Fyrsta hálvár í 2004 vórðu 48 motorsúkklur innfluttar til Føroya

75 umsóknir til teori og 98 til koyring eru í løtuni á bileftirlitinum til motorsúkklu

450 skrásettar motorsúkklur eru í Føroyum

Løgreglan:

# Vit gjørdu okkara skyldu

**Av løgreglustøðini sigur vakthavandi, at løgreglan var ábyrgdarfull og gjørdi sítt arbeiði undir tilburðunum í Suðurstreymoy týsdagin, og sambært teimum verður neyvan nakað rættarmál av, at tveir ósekir motorsúkkluførarar vórðu kroystir av vegnum**

FERÐSLA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Omanfyri á síðuni greiðir motorsúkkluførari frá, at hann saman við einum øðrum varð av løgreglubili kroystur av vegnum týsdagin seinnapart í eini politijagstran eftir einum øðrum motorsúkkluførara.

Av løgreglustøðini sigur vakthavandi, at tey í rapportini hava somu útgávu av tilburðinum, men hinvegin verður av politistøðini sagt, at førarin í politibilinum gjørdi sína skyldu, tá hann helt, at annar av motorsúkkluførarunum møguliga var hann, løgreglan jagstraði.

– Tað hevði ikki verið rætt at latið hesar sloppið framvið, um møguleiki var fyri, at annar av hesum var tann, vit jagstraðu, sigur vakthavandi.

## Ikki rættarmál

Vakthavandi á løgreglustøðini sigur, at nakað rættarmál neyvan stendst av hesum tilburðinum, hóast báðir motorsúkkluførararnir hava meldað, men hetta er so ein sak, sum løgfrøðingarnir nú skulu gjøgnumganga og síðani meta um, eftir at ferðsluóhappsrapport er skrivað.

– Men eg kann ikki ímynda mær, at nakað rættarmál stendst av hesum, hóast sakin verður viðgjørd, sigur løgreglan.

## Ábyrgdarfull løgregla

Spurd, um talan var um ábyrgdarfullan atburð hjá løgregluni á vegunum í Suðurstreymoy týsdagin, tá ein motorsúkkluførari við máldari ferð á 193 km/t varð jagstraður og fangaður, meðan tveir aðrir vórðu kroystir av vegnum, er løgreglan greið.

– Løgreglan koyrdi týsdagin ikki eins skjótt og jagstraða motorsúkklan, og orsøkin til, at maðurin varð tikin við Mjáuvøtn var, at motorsúkkla hansara brendi saman, greiðir vakthavandi frá. Um hetta ikki hevði hent, høvdu løgreglubilarnir ikki vunnið fram á motorsúkkluna, sigur løgreglan.

– Førarar okkara koyrdu ikki eins skjótt og motorsúkklan, og vit høvdu helst latið motorsúkkluna farið, um hon ikki varð brend saman, sigur vakthavandi. Lagt verður afturat, at løgreglan bert metti seg gera sína skyldu týsdagin, og at politibilarnir ikki koyra skjótari, enn trygt og ábyrgdarfult er, sigur vakthavandi á løgreglustøðini.

– Men sjálvandi skulu vit koyra aftaná og royna at taka slík, sum koyra so skjótt, uttan at vit seta onnur í vanda, sigur løgreglan greið.




*– Løgreglan koyrdi týsdagin ikki eins skjótt og jagstraða motorsúkklan, og orsøkin til, at maðurin varð tikin við Mjáuvøtn var, at motorsúkkla hansara brendi saman, greiðir vakthavandi á løgreglustøðini frá*
*Mynd: Jens Kristian Vang*